gult cyan magenta svart

– Nær sleppa vit í gongd

Tey lítlu, kviku beinini vi› teim smáu gaggunum høvdu torført vi› at binda fri›. Ta› gekk heldur ikki long løta, so kom røringur í á graslíkinum í Klaksvík, í Vági, í Havn og á Toftum. Kynstrini hjá Zidane, Figo og hvat teir nú eita skuldu roynast

Dia Midjord

Ein etur ofta skerpikjøt upp á brey› og er tískil stórur og sterkur. Men hesin hevur ikki so gó› evnir. Ein annar er vanur vi› nøtte ella sjokulátu, hevur ein nógv minni kropp, men hevur so væl signa› gó› evnir, at hann altí› sleppur undan takklingum. Ein tri›i hevur ikki so gott tamarhald á beinunum og bóltrætningi-num.

Tann í Manchester United búna líkist Kára Reynheim og hevur serligan hug at hava bóltin fyri seg sjálvan. Ein annar hevur spælistílin hjá Jóannes Jakobsen og roynir vi› longum sending-um. Allir royna sum frægast og strí›ast fyri lívinum. Fótbóltsskúlin er byrja›ur

Kanska tveir skúlar

Teir smáu fótbóltsleikarar-nir, i› farna vikuskifti luttóku á Føroya Fótbóltsskúla, gjørdu sítt ítarsta. Og ta› sama gjørdu venjararnir.

Ein teirra, i› hevur veri› venjari nøkur ár, og sum seinastu árini meira hevur fingist vi› samskipan av tiltakinum, er Petur Simonsen. Vit hava spurt hann, hvønn t‡dning ein slíkur skúli hevur.

– Upprunaliga var ætlanin vi› slíkum skúla, at aktivera fleiri
børn og solei›is skapa størri áhuga fyri fótbóltsspælinum. Í dag haldi eg ikki, at hetta hevur so stóran t‡dning. Dentur ver›ur meira lagdur á sjálvt fótbóltsspæli›, har leikararnir kunnu mennast bæ›i tekniskt og taktiskt. Fótbóltsskúlin er meira ein serskúli í dag.

Petur Simonsen sigur ví›-ari, at fótbóltsskúlin í dag kortini ikki samlar so nógvar av teimum heilt gó›u dreingjunum, i› dagliga leika á bestu li›unum í feløgunum.

– Sjálvandi eru nakrir, men teir, i› ikki gera so nógv vi› regluliga venjing í feløgunum, eru betri umbo›a›ir. Hetta eru dreingir, i› síggja ta› stuttliga vi› at møtast og hugna sær saman vi› jamaldrum, sigur Petur.

Hann heldur, at tí›in nærkast, tá FSF kanska skuldi havt tveir skúlar.

– Vit mugu alla tí›ina laga skúlan eftir tí›ini. Fyri at røkka bæ›i breiddini og elituni, skuldu kanska tveir skúlar veri›. Ein, har dentur var› lagdur á samveru og ta› sosiala, me›an hin skuldi veri› meira ambitiøsur, sigur Petur.

– Ein skúli fyri elituna vildi sjálvandi kravt nógvar broytingar í mun til verandi skúla, bæ›i vi›víkjandi innihaldi, uppleggi, upptøku til skúlan og nógv, nógv anna›.

Ta› er heldur ikki vist, at verandi skipan, har skúlarnir eru á ymsum stø›um kring landi›, er tann rætta.

– Fyrr samla›ust leikarar úr øllum landinum í Havn, me›an í dag kanska tú einans møtir teimum, tú kennir frá nærumhvørvinum. Spurningurin er, um ein slíkur skúli ikki líkist ov nógv einum vanligum venjingarkvøldi, sigur Petur Simonsen.

Føroyski Fótbóltsskúlin

Í ár bleiv fótbóltsskúlin skipa›ur á fimm ymiskum stø›um: Í Vágunum, í Klaksvík, í Vági, í Havn og á Toftum. Tilsamans luttóku útvi› 750 børn á skúlanum.

Níggju høvu›svenjarar tóku sær av frálæruni: Jógvan Martin Olsen, Albert Ellefsen, Annfinn Danielsen, Kári Purkhús, Hans Mourits Foldbo, Petur Simonsen, Eli Hentze, Mathias Davidsen og Álvur Hansen.

gult cyan magenta svart

Per gjørdist sjúkrasystir

Hetta er tri›ja fer›in sí›an stovningarári 1960, at Sjúkrasystraskúli Føroya hevur givi› einum mannfólki prógv sum sjúkrasystir

Per Johannessen, i› her fær prógvi› handa›, helt fráfaringarrø›una hjá sjúkrasystrunum á samkomuni í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum

Myndir: Jens Kr. Vang

Anni Jensen var eisini ein av teimum 17 sjúkrasystrunum sum fekk prógv seinasta fríggjadag

Dia Midjord

Si›venja í Føroyum er, at konufólk fara undir sjúkrasystralestur. Men ta› kemur fyri, at okkurt mannfólk eisini bjó›ar seg fram.

30. juni vór›u 17 sjúkrasystrar lidnar, og teirra millum var Per Johannessen. Hann hevur tiki› tr‡ ár av útbúgvingini í Danmark, men valdi at taka sí›sta ári› í Føroyum.

Hvussu riggar so, tá ein er einsamallur millum 16 konufólk.

– Ta› er eingin trupulleiki. Tær hava allar veri› óføra fittar og hava tiki› sera væl ímóti mær. Og tær vilja meira enn fegnar hava fleiri mannfólk at taka útbúgvingina, sigur Per.

Hann starvast á medisinsku deild á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hvørjar fyrimunir hevur hann so í einum konufólkayrki?

– Ta› er kanska ta›, at eg lættari kann hjálpa um byr›an er tung, men annars er so at siga eingir fyrimunir.

Hvussu ver›ur tú móttikin av sjúklingunum?

– Ta› er sum allar a›rar sjúkrasystrar ver›a móttiknar. Einafer› mátti eg fortelja einum sjúklingi, at eg var sjúkrasystir og ikki portørur, sum hesin helt, sigur Per Johannessen.

Saman vi› sekstan ø›rum sjúkrasystrum fekk Per Johannessen prógvi› handa› 30. juni. Hetta var á eini samkomu í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.

Hildur vi› Høgadalsá, lei›ari á skúlanum, handa›i prógvini. Umframt felagssang og skemt frá tri›ja árs næmingum, helt Julia Hayfield, deildarsjúkrasystir, gestarø›u.

Og sjálvandi var ta› einsamalli hanin millum allar hønurnar, i› helt rø›una hjá teimum n‡lærdu sjúkrasystrunum.

Hesi hava fingi› prógv sum sjúkrasystrar. Standandi frá høgru: Marjun Thomsen, Ester Simonsen, Ellern Rasmussen, Óluva Poulsen, Poula R.-Petersen, Ella Olsen, Harriet Lamhauge, Per Johannessen, Sigrid Jógvansdóttir og Kára D. Joensen. Sitandi frá høgru: Tórger› H. Jensen, Anni Jensen, Annika Jacobsen, Malan Horn, Marianna Heinesen, Sirikit Hansen og Valbjørg S. Gaard.